Dagf. 20. mai 2020
HMR J. nr. 20/00465-5

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 81/2019 eftir § 52a í tingskipanini viðvíkjandi bíðitíðum í psykiatriini frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni

Spurningurin var soljóðandi:

1. Hvussu er aktuella støðan viðvíkjandi bíðitíðum í psykiatriini?
2. Hvussu er aktuella støðan viðvíkjandi bíðitíðum til útgreinan fyri ADHD og autismu?
3. Kunnu vit vænta, at serligu umstøðurnar í.s.v. Koronusmittuna ávirka bíðitíðirnar í psykitatriini?
4. Og um so er, hvussu nógv kunnu fólk vænta, at bíðitíðirnar verða longdar?

Svar:

Til spurning 1, 2, 3 og 4
Løgtingsmaðurin nágreinar í viðmerkingunum, at talan er um bíðitíðirnar hjá børnum, sum skulu útgreinast fyri serligar avbjóðingar so sum ADHD og ella autismu. Tað er við støði í hesum, at svarað verður.

Samanumtikið hevur hetta tíðarskeiðið við koronu ávirkað og seinkað møguleikarnar at koma til útgreiningar, og tí eru bíðitíðirnar nakað longri í dag enn áðrenn Grækarismessu.

Tað hevur ávirkan á bíðitíðina, um talan ávikavist er um planlagt virksemi, ella í hvønn mun talan er um bráðfeingis støður. Tílíkar avgerðir byggja altíð á eina læknafakliga meting.

Í løtuni er vanliga planlagda bíðitíðin at koma til útgreiningar fyri ADHD og autismu umleið 4-5 mánaðir. Tað merkir, at bíðitíðin er longd 1-2 mánaðir hetta tíðarskeiðið, meðan avmarkingar hava verið í teimum ambulantu viðgerðunum orsakað av koronastøðuni.

Landssjúkrahúsið hevur upplýst fyri Heilsumálaráðnum, at Barna- og ungdómspsykiatriin fekk sjáldsama nógvar ávísingar í februar og mars 2020, sum eisini ávirkaði bíðitíðina, men henda gongd hasaði av, tá koronasmittan fór at gera um seg, og avmarkingar vóru gjørdar í teimum ambulantu viðgerðunum.

Barna- og ungdómspsykiatriin arbeiðir sjálvsagt við at minka um bíðitíðina mest møguligt og skjótast gjørligt, men tað er sera torført at meta um, hvussu tað fer at gangast við at minka aftur um bíðitíðina fyri tær viðgerðir, sum ikki eru bráðfeingis. Hetta er tengt at, hvussu gongdin verður við ávísingum til Barna- og ungdómspsykiatriina, nú gerandisdagurin aftur verður meira vanligur í kommunulæknaviðtaluni og á Sernámi.

Samgongan hevur sum flestum kunnugt sett sær sum mál at fáa viðgerðartrygd sett í verk í sjúkrahúsverkinum. Fyri jól handaði ein arbeiðsbólkur landsstýrismanninum tilmæli um, hvussu farast kann fram í arbeiðinum at skipa viðgerðartrygd í Føroyum. Hetta arbeiðið er eisini nakað seinkað av koronastøðuni, men verður tikið uppaftur. Talan er um eitt arbeiði, sum landsstýrismaðurin raðfestur høgt.

Heilsumálaráðið, 20. mai 2020

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður